gult16 cyan16 magenta16 svart16



# Musikkskúlaskipanin

## Royndir verða í november 2001

Royndir í ljóðførisspæli, sangi og skrivligari teori verða í november 2001. Næmingar tekna seg sjálvbodnir, og støðutakan eigur at verða tikin í samráð við lærara fyri summarsteðgin.

Próvdómari frá Associated Board of the Royal Schools of Music í London kemur higar.

Føroyskur tulkur er til royndirnar.

**Endamál**
- Royndirnar geva næmingi møguleika at seta sær ávegis mál, og at fáa eina meting eftir altjóða støði.
- Prógv verður givið tá ið royndin er staðin. Minsta krav er 100 av 150 møguligum stigum.

**Royndirnar**
Roynd fyri byrjarar har skrivligt ummæli verður givið beinanvegin. (Preparatory Test)

Roynd fyri leikarar eldri enn 21 ár, byrjarar eins og yrkisleikarar, sum ynskja eitt óheft, professionelt skrivligt ummæli beinanvegin, og eina samrøðu við próvdómaran. (Performance Assessment).

Stig **1, 2, 3, 4, og 5** royndirnar eru skipaðar soleiðis:

- Næmingurin spælir trý sjálvvald stykkir av ABRSM lista, ið hann hevur lært seg frammanundan.
- Næmingurin spælir teir tónastigar (skalair) og tríljómar (arpeggios), sum standa í ABRSM skránni.
- Næmingurin spælir eitt stutt stykki, sum hann ikki hevur sæð frammanundan.
- Næmingurin verður biðin at klappa antin pulsin ella lag-rútmuna meðan próvdómarin spælir á klaver.
- Næmingurin skal siga um stykkið gongur í tveimum, trimum ella í fýra sløgum í taktini.
- Próvdómarin spælir ein stuttan setning tvær ferðir. Næmingurin verður biðin at syngja ella murra tað sama beint eftir at dómarin er liðugur.
- Á hægru stigunum verður næmingurin biðin at syngja nakrar tónar eftir nótum. Próvdómarin spælir fyrsta tónan og spælir eisini rættan tóna, um næmingurin fer skeivur.

Royndirnar vara umleið 12-16 minuttir.

Fyri at sleppa til roynd á ljóðføri ella í sangi í 6., 7., og 8. stigi, skal næmingurin hava staðið skrivligu teoriroyndina á 5. stigi. Skrivligar teoriroyndir eru tríggjar ferðir um árið.

**Próvtøkugjøld**

| Í ljóðførisspæli ella sangi | Í skrivligari teori |
|---|---|
| Roynd fyri byrjarar (Preparatory Test) kr 260,- | |
| Stig 1 kr. 320,- | Stig 1 kr. 180,- |
| Stig 2 kr. 360,- | Stig 2 kr. 180,- |
| Stig 3 kr. 360,- | Stig 3 kr. 180,- |
| Stig 4 kr. 430,- | Stig 4 kr. 240,- |
| Stig 5 kr. 430,- | Stig 5 kr. 240,- |
| Stig 6 kr. 500,- | Stig 6 kr. 310,- |
| Stig 7 kr. 580,- | Stig 7 kr. 310,- |
| Stig 8 kr. 640,- | Stig 8 kr. 310,- |

Roynd fyri tónleikarar eldri enn 21 ár (Performance Assessment) kr 430,-
Prógv á konservatoriistøði (Advanced Certificate), úr kr. 1.140,- til kr. 6.090,-

Tilmelding í seinasta lagi 21. september 2001 hjá Musikkskúlaskipanini, Hoyvíksvegur 72, FO 100 Tórshavn, tlf. 316462, fax 316991, t-postur: martin@mms.fo

Meira fæst at vita hjá leiðaranum Martin Mouritsen tlf. 216462.

# Við Miðnámsskúlan í Suðuroy

eru eitt starv sum lektari/adjunktur/royndarsettur adjunktur frá 1. august 2001, leys at søkja í

**Evnafrøði**
Setan fer fram sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Yrkisfelag studentaskúla- og HF-lærara (YF).

Umsóknin á oyðublað frá YF verður stílað til Føroya Landsstýri, Mentamálastýrið, Tórshavn, men verður sent til

**Miðnámsskúlin**
Att.: Ole V. Laursen, FO 900 Vágur
Tlf. 373622 · fax 374026 · e-mail: midnam@midnam.fo

Umsóknir skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 21. mai.

TK Stovan

Ring!
Vit koma

TK Stovan er óheft og veitir ókeypis ráðgeving til føroysku vinnuna.

Vit koma fegin á vitjan, og hjálpa við at kanna tín tørv og tínar menningarmøguleikar. Tú fært greiða kunning um lógir, kunngerðir, fíggjarmøguleikar v.m.

31 73 66
www.tk.fo

TK Stovan
Niels Finsensgøta 37
FO-100 Tórshavn
Fax 319363
www.tk.fot
E-mail tk@tk.fo

VILJI VITAN VØKSTUR

Mold fæst

í Tórshavn við at gjalda fyri koyringina.

Tlf. 217452

Keyp og søla av skipum



• Skipamekling
• Skipaumboðan
• Skiparakstur

Meira fæst at vita á:
Tlf. 318531 • Fax 319369

TOR SHIPPING
Niels Finsensgøta 23 · Box 1252 · 110 Tórshavn
e-mail: torship@post.olivant.fo www.torship.com

Suðuroyingar!
Nýtt skeið
Lastbil
Trailara
Buss
á Drelnesi
mánakv. 21. mai. kl. 20.00
(um nóg nógv tekna seg)
www.team85.fo
SP/F Koyrikortið
Tórshavnar Trafikkskúli
Stoffalág 82
Tel 318821 • 315298
Fartel 218777

Sosialurin
Sosialurin
í

Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg

Koyrt ov skjótt ?
Mist koyrikortið ?
Teori til endurtøku & eftiransandi koyriroynd
Skipað verður fyri vikuskiftisskeiði (ástøðisskeiði)
10. - 13. mai
(um nóg nógv tekna seg)
www.team85.fo
SP/F Koyrikortið
Tórshavnar Trafikkskúli
Stoffalág 82
Tel 318821 • 315298
Fartel 218777

Vágafólk !
Nýtt skeið
til
Buss Lastbil Trailara
í Vágum
mánakv. 21. mai
kl. 19.00
- um nóg nógv tekna seg -
nærri fæst at vita:
www.team85.fo
SP/F Koyrikortið
Tórshavnar Trafikkskúli
Stoffalág 82
Tel 318821 • 315298 • Fartel 218777

gult17 cyan17 magenta17 svart17

ítróttur
Nr. 88 • mikudagur • 9. mai 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

## Støðan, 1. deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 3 | 3 - 0 - 0 | 12 | 2 | 10 | 9 |
| 2 | VB | 3 | 1 - 1 - 1 | 6 | 3 | 3 | 4 |
| 3 | HB | 3 | 1 - 1 - 1 | 6 | 8 | -2 | 4 |
| 4 | B36 | 3 | 0 - 0 - 3 | 4 | 15 | -11 | 0 |

# KÍ-kvinnurnar einaráðandi

**Hóast týdningurin av grundspælinum er lítil og eingin, so kann longu staðfestast, at KÍ kvinnurnar eru stórfavorittar at endurvinna FM-heitið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hetta umfarið mundi størsti spenningurin vera um, hvussu alt fór at laga seg, tá føroyameistararnir úr KÍ fóru á vitjan í Gundadali. Roknað varð við, at HB fram um hini liðini kundi geva KÍ harða mótstøðu.

### Helt bert eina løtu

Fyrstu løtuna av dystinum bendi eisini á, at HB veruliga kundi gera KÍ fortreð. Tær á heimaliðnum royndu at leggja trýst á frá byrjan, men málmøguleikar komu tó einki serligt av. Hinvegin eydnaðist tað KÍ at koma betri við í dystin, og um miðjan hálvleikin kundi Elsa Maria Simonsen leggja bóltin í HB-málið.

Eftir hetta hevði KÍ tak á tí mesta, sum fyrifórst, men hóast fleiri møguleikar, so kom einki mál undan steðginum.

Í seinna hálvleiki tóktust tær á heimaliðnum at vera vorðnar heldur moyrar, og uttan stórvegis hóvasták kundi KÍ nú staðfesta sigurin.

Fyrst slapp Malena Josphsen einsamøll móti og fram við HB-málverjanum, áðrenn hon legði bóltin í netið, og fáa minuttir seinni legði Malena ein langan bólt til Vivan Bjartalíð, sum stútaði til 3-0.

Seinasta málið í dystinum fall eisini til KÍ, og var tað hesa ferð Bára Skaale, sum keyt helst vakrasta málið í dystinum, tá hon við vinstra beini langaði bóltin í kassan.

Við sigrinum eru KÍ-kvinnurnar longu fimm stig undan VB og HB í grundspælinum. Stigini her hava tó ikki tað stóra at siga, tí tey verða øll strikað undan endaspælinum, men hinvegin hava úrslitini hjá KÍ higartil bent á eina sanna styrkisuppvísing. Bert í heimadystinum móti VB hava tær verið kroystar, men alt í alt er ilt at ímynda sær, at nakar fær gjørt nakað við oddastøðu teirra hetta kappingarárið.



*Føroyameistararnir úr KÍ vunnu tryggan sigur á HB, og eru longu nú fimm stig undan næsta liðnum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Halldóra fekk hat-trick

B36, sum annars í fleiri ár hevur havt sterkt kvinnulið, tykist als ikki at hava fingið fótin fyri seg higartil í ár. Um vikuskiftið vitjaðu tær í Vági, og her gjørdist talan um ein tryggan sigur til heimaliðið.

Serliga í fyrra hálvleiki var stórur munur á liðunum, og sagt verður, at B36 als ikki hótti VB-málið hesi trý korterini. Halldóra Joensen, ið eins og í fjør er sjálvskrivað í VB álopinum legði fyri við málskjótingini, og eftir at Marita Joensen hevði økt til 2-0, skeyt Halldóra enn eitt mál, áðrenn farið varð til hálvleiks.

Eftir steðgin var munurin millum liðini als ikki eins sjónligur, men hóast hetta, so hevði VB fult tamarhald á støðuni alla tíðina. Burtur sæð frá einstøkum skotroyndum, hildu tær mótstøðukvinnunum burtur frá egnum máli, og tað var eisini VB, sum fekk einasta málið eftir steðgin, og var tað enn eina ferð Halldóra, sum stóð fyri hesum.

VB er sostatt ájavnt á øðrum plássi, tó at tær í Vági hava betri málmun. Hinvegin er B36 niðast í deildini, og líkt er tí til, at tær skulu royna seg í einum upp- og niðurflytingardysti móti triðbesta liðnum í aðru deild.

HB - KÍ 0 - 4 (0 - 1)
0 - 1 Elsa Maria Simonsen, 25. min.
0 - 2 Malena Josephsen, 53. min.
0 - 3 Vivian Bjartalíð, 55. min.
0 - 4 Bára Skaale, 90. min.

VB-B36 4-0 (3-0)
1-0: Halldóra Joensen
2-0: Marita Joensen
3-0: Halldóra Joensen
4-0: Halldóra Joensen

## Máltindurin

| | | |
|---|---|---|
| Malena Josephsen | KÍ | 5 |
| Eyðfríð Kristiansen | HB | 3 |
| Halldóra Joensen | VB | 3 |
| sjálvmál | | 3 |
| Súnfríð Simonsen | B36 | 2 |
| Rannvá Andreasen | KÍ | 2 |
| Vivian Bjartalíð | KÍ | 2 |
| Marita Joensen | VB | 2 |
| Sólvá Joensen | B36 | 1 |
| Annika Godtfred | HB | 1 |
| Kristina Eyðbjørnsdóttir | HB | 1 |
| Lydia Vesturtún | HB | 1 |
| Bára Skaale | KÍ | 1 |
| Elsa Maria Simonsen | KÍ | 1 |

# FCK styrkti sína støðu

**AGF sigurin á FCM hevði við sær, at FCK er uppaftur betri fyri í toppstríðnum, og at Herfølge nú bara kappast við AB um at sleppa undan niðurflyting**

SUPERLIGA
*Jóannes Hansen*

Tað var so gott fótbóltslag í Århus mánakvøldið, sum tað ikki hevur verið leingi. AGF hevur havt afturpartin í vatnskorpuni alt kappingarárið. Áskoðararnir høvdu mist mótið um, at tað skuldi eydnast at varðveita sessin í bestu deildini, pengaligu stuðlarnir hildu seg burtur, og tað tóktist sum um eingin vildi vita av gamla stórfelagnum.

Nú er rættulig vend komin í. Knapt sjey túsund áskoðarar møttu mánakvøldið. Liðið hevur rættuliga havt undanvind, síðani gamli generalurin í verjuni, John Stampe, sum eina ferð áður hevur verið bjargingarmaður í venjarasessinum, tók ábyrgdina á seg, tá hin venjarin segði upp.

Hesa ferð vitjaði FCM, sum við sigri hevði havt møguleika at leggja seg einsamalt á odda í superliguni. Tvær ferðir áður hava hesi liðini spælt í landskappingini í hesum kappingarárinum. Báðu ferðirnar hevur AGF vunnið, og AGF vann eisini hesa ferð. 2–0 sigurin ber við sær, at teir rættuliga hava lagt sjógv ímillum seg og AB og Herfølge, sum stríðast um at sleppa undan øðrum niðurflytingar plássinum.

Herfølge fer í kvøld at spæla á útivølli í Lyngby.

FCM var ágangandi ímóti AGF. Oddaliðið trýsti, og teir høvdu fleiri møguleikar, men teir fingu einki mál. Heimaliðið var væl skipað í verjuni, teir høvdu ein fínan málverja, og so dúvaðu teir upp á mál í snarálopum.

Fimm minuttir eftir steðgin fekk Bo Nielsen mál. So styrknaðu fyritreytirnar hjá AGF at verja. FCM trýsti uppaftur meiri, men teir megnaðu ikki at skora, og í evstu løgu økti Bo Nielsen, sum nú hevur skorað átta mál í átta dystum, til 2–0.

AGF sigurin hevði við sær, at tað er púra greitt, at FCK er næstfremst, nú tað resta seks umfør í hesum kappingarárinum. Brøndby er eitt stig frammanfyri FCK, Silkeborg og FCM, sum øll hava sama stigatal.